## VIÐMERKINGAR

# Grát mín elskaða bygd

**Tórolvur Skaalum**
*Ein vónsvikin skattaborgari í Sørvági*

Bleiv tað sagt Vesturvón ja so segði man Sørvágur. Vesturvón hevur verið við til at sett Sørvág á føroyakortið.

Vaknaði við kaldan dreym og trúði ikki mínum egnu oyrum, tá í útvarpið hevði tey syrgiligu tíðindi, at p/f Vesturvón var selt til eitt smápartafelag Framherji í Toftum?, sum tjóvur á nátt hvarv ein sunn og stabil fyritøka sum døgg fyri sólini. Eini 100 fólk sum hava tilknýti til fyritøkuna stand nú so at siga á berum, alt virksemi er farið í søguna. Sørvágur hevur mist hønuna, sum varp gull eggið. Av berum innanhýsis klandri, eftir blaðskriving at døma og sum millum manna sigst, takka verði millum annað einum nevndarlimi, sum sat í nevndini í eitt kráku ár. Hann, sum skuldi vera við til at skapa stabilitet og framburð í fyritøkuna, tykist firtin um, at verða lagdur undir at hava stungið reiðaran og nevndina knívin í ryggin. Reiðarin, sum millum annað hevur æruna av, at fyritøkan hevur verið dynamisk og væl rikin gjøgnum árini.

Var endamálið hjá teimum at sorla fyritøkuna sundur, so kláraðu tey tað so meistaraliga, skamm fái tykkum fyri tað.

Havandi í huganum nettupp tað, at kommunan í kreppu tíð setti pening í fyritøkuna svarandi til ca eina hálva álíkning, við tí fyri eyga at varðveita fyritøkuna í oynni, og at hindra at eigararnir í ringasta føri fóru frá húsi og heimi, og at Vesturvón ikki endaði í Íslandi saman við Stella Carinu og Katrinu.

Nei sørvingar fingu ongan møguleika at bjóða uppá partabrøvini. Líkamikið hvussu nógv nevndarlimurin í Sandavági vendur og dregur tingini, so hevur hon ikki melda klárt út við síni ætlan. Hví bað hon ikki um ein eyka aðalfund? Um so var, hugsi eg at støðan var ein heilt onnur, endamáli var eittans? Og at tú onga ávirkan hevur havt á fyritøkuna, fari eg at loyva mær at ivast í. Álvara tos, hvør hevur siglt við Vesturvón sum skipari í mong ár?

Eg fari at ynskja tykkum sum nú á berum standa eina bjarta framtíð.



## Lítli prinsur komin heim

Eini 1.500 fólk tyrptust við dyrnar til Ríkissjúkrahúsið seinnapartin týsdagin at siggja stoltu, nýggju foreldrini, Fríðrik krúnprins og Mary prinsessu á fyrsta sinni vísa fram nýggja trúnarving Danmarkar.

Men tann lítli prinsurin legði sjálvandi einki til merkis.

Meðan pápi og mamma sum frægast royndu at svara teimum um 200 fjølmiðlafólkunum, lá lítli prinsur við eini lítlari húgvu, sveiptur í eitt hvítt, heklað sjal - og svav.

- Hann hevur eitt róligt sinni, segði stolta mamman.

- Nú fara vit heim at skifta blæu, segði Fríðrikur, beint áðrenn hann setti seg í VW Turano jeepin, sum hann sjálvur koyrdi heim við konu og soni.

### 12 daga barnsburðarfarloyvi

Donsku miðlarnir hava gitt nógv um, hvussu leingi krúnprinsurin fer at verða í barnsburðarfarloyvi. Svarið kom í morgin: Í 12 dagar! Heimasíðan hjá kongshúsinum sigur, at prinsurin aftur fer til verka 26. oktober, tað hann letur up ráðstevnuna hjá Dansk Industri og Vindmølleindustriens konference »Copenhagen Offshore Wind International« í Bella Centrinum.

# Landsstýrið tekur útjaðaran sum gísla

## - og brúkar hetta til álop á grundleggjandi rættindi hjá fakfeløgum

**Høgni Hoydal**



Tað er við bilsni og treða, at eg síggi, hvussu samgongan við løgmanni á odda fer fram á arbeiðsmarknaðinum og ímóti útjaðaranum.

Bárður Nielsen og landsstýrið hava av sínum eintingum blakað samfelagið út í ein arbeiðssteðg, og hava tikið fólk og vinnu í útjaðaranum til gísla fyri fáa sín vilja ígjøgnum mótvegis einum fakfelag.

Serliga útjaðarin bløðir fyri, at landsstýrismaðurin ikki megnar at samráða seg til eina semju, hóast mótparturin eftir øllum vanligum mannagongdum og eftir seming, hevur góðtikið úrslitið av semingsroyndunum.

Skipini kunnu sigla aftir beinanvegin, um løgmaður og samgongan gera sínum landsstýrismanni greitt, at hann hevur ábyrgdina av støðuni og at tað áliggur honum at finna semju.

Men ístaðin fer løgmaður í tingið at løggeva ímóti avleiðingunum av gerðunum hjá sínum egna landsstýri. Og løgmaður brúkar tað so sera væl skiljandi ónøgdina í útjaðaranum til at geva fakfeløgunum skyldina fyri verkbannið hjá landsstýrinum.

Tað er ikki bert ein grundlógartyggjaður rættur, men eisini partur av altjóða mannarættindum at fakbólkar kunnu samráða seg til síni sáttmálaviðurskifti. At partarnir á arbeiðsmarknaðinum við teimum amboðum, teir hava, kunnu skipa síni egnu sáttmálaviðurskifti.

Nú fer samgongan við einum javnaðarløgmanni á odda at brúka løggávuvaldið til at seta rættindini hjá fakfeløgum til viks fyri at fremja viljan hjá arbeiðsgevaranum - enntá eftir at eitt fakfelag hevur góðtikið úrslitið av eini semingsroynd.

Sjálvt tá fakfeløg hava verið í verkfalli, hevur verið breið semja um ikki at brúka løggávuvaldið til at taka ábyrgdina og rættindini frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Men nú verða hesi grundleggjandi prinsipp og rættindi sett til viks, tí landsstýrið sum arbeiðsgevari ikki góðtekur úrslitið av eini seming og hevur framt verkbann.

Fremur samgongan eina slíka dáragerð, so fer tað at fáa djúptøknar avleiðingar fyri allan arbeiðsmarknaðin og fyri føroyska samfelagið í mong ár frameftir.

Tí havi eg staðiliga mælt løgmanni frá at misnýta løggávuvaldið á henda hátt, og ístaðin at loysa málið í kvøld við at samráða seg til semju. Landsstýrið hevur jú sjálvt lykilin í egnum lumma.

Sosialurin
Sosialurin
i
Sosialurin
Sosialurin

# BLF mótmælir skerjing av samráðingar- og verkfallsrættindum

## - hetta útsetir menning av einum skipaðum føroyskum arbeiðsmarknaði

**TÍÐINDASKRIV**
*frá Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya*

Landsstýrið fer í dag at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið, ið fer at skerja grundleggjandi verkfallsrættindi hjá fakfeløgum í Føroyum.

Løgtingið verður sostatt enn einaferð nýtt sum amboð at skerja samráðingar- og verkfallsrættindi. Í summar stóðu SEV og Maskinmeistarfelagið fyri skotum, tá samtykt samráðingaruppskot varð vrakað av Løgtinginum, og í dag er tað Starvsmannafelagið, ið fær skert verkfallsrættindi síni munandi.

Hesum vil Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya (BLF) staðiliga mótmæla.

**BLF vil í staðin heita á landsstýrið um at samtykkja semingsuppskotið ella skjótast til ber at taka sáttmálasamráðingarnar uppaftur av nýggjum.**

Alneyðugt er, at álit verður skapt millum fakfeløgini og landsstýrið. Hetta er ein fyritreyt fyri, at fáa ment ein skipaðan føroyskan arbeiðsmarknað, har m.a. høvuðsavtalur verða gjørdar partanna millum og fastur gerðarrættur verður stovnaður.

**BLF fer tí staðiliga heita á landsstýrið um, at virka fyri áliti og varandi semjum á arbeiðsmarknaðinum - heldur enn einaferð enn at nýta Løgtingið sum amboð at skerja rættindi hjá fakfeløgum, tí hetta kann bert skapa misálit og seinka menningini av einum skipaðum føroyskum arbeiðsmarknaði.**

Sosialurin
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo